## Hægsta toppskattin

Eingir skattgjaldarar í ES-londunum rinda so nógvan skatt av teirri seinast forvunnu krónuni sum danir. Tað vísir ein kanning hjá OECD. Kanningin vísir, at ein danskur løntakari rindar 63 prosent í skatti av teirri seinast forvunnu krónuni, Belgia er á øðrum plássi við 59,6 prosentum og Svøríki á triðja plássi við 56,5 prosentum. Seinastu árini er marginalskatturin fallin munandi í ES-londunum, men næstan einki í Danmark, sigur OECD.

## Skjóta sildreka

Íslendska stjórnin hevur gjørt av at loyva hvalabátum at skjóta 39 sildrekar til vísindaligar kanningar í ár. Ætlanin var, at bátarnir skuldu fara út í gjár, men teir settust aftur, tí veðrið var heldur ólagaligt. Hvalabátarnir skutu tríggjar sildrekar í síðsta mánað, 31 skulu skjótast í summar, og teir seinastu fimm skulu so skjótast í heyst, skrivar Morgunblaðið. Kanningarnar eru lið í einari verkætlan, sum bleiv løgd fyri fýra árum síðani.



*Tey fyrstu árini sigldi Skurin serliga við fóðuri fyri Ewos, men tá alivinnan var í stórari kreppu, sigldi skipið fyri fleiri viðskiftafólk*

**Við fóðuri**

Jóhanna á Bergi vísir á, at bæði Skurin og Sirius serliga hava siglt við alifóðuri – bæði úr Føroyum og heim til Føroya, eins og skipini hava siglt við fóðuri millum aðrar havnir her um okkara leiðir.

**FAKTA**

| | |
|---|---|
| Navn: | Skurin |
| Heimstaður: | Norðragøta |
| Smíðistaður/ár: | Ringkøbing (1975) |
| Longd: | 49,75 metrar |
| Breidd: | 8,30 metrar |
| BRT: | 299 |
| Maskina: | B&W Alpha 470 HK |
| Ferð: | 10 míl |
| Eigari: | H.T. Shipping Sp/f |
| Útgerðarmaður: | Tórhallur Thomsen |

Hon vil ikki upplýsa søluprísin fyri Skuran.

Útgerðarmaður aftanfyri felagið, H.T. Shipping, er Tórhallur Thomsen.

Hann sigur, at orsøkin til søluna er ikki, at minni er at sigla við.

- Tíðin stendur ikki í stað, og marknaðurin broytist. Tiðin krevur størri og betri skip, sigur Tórhallur Thomsen, útgerðarmaður.

Umframt at vera útgerðarmaður, umsitir hann eisini lastbilarnar hjá Faroe Ship.



*Farmaskipið Skurin er seldur til Fraklands og teir átta menninir, sum eru knýttir at skipinum, eru sagdir úr starvi sambært galdandi uppsagnartreytum*

*Mynd: Skipalistin/ Leivur Nygaard*

# Faroe Ship væl nøgd við NAFF

**Jóhanna á Bergi, stjóri í Faroe Ship, sigur, at tey vóru sera væl nøgd við North Atlantic Fish Fair, hóast talið av vitjandi á básinum hjá teimum var heldur minni enn seinast**

NAFF
*Vilmund Jacobsen*
vilmund@sosialurin.fo

- Jú, vit eru stak væl nøgd við fiskivinnuframsýningina. Vit høvdu kanska ikki so nógv vitjandi á básinum hesaferð sum seinast, stevnan varð hildin, men fyri tann skuld vóru tey vitjandi ikki minni áhugaverd.

Jóhanna á Bergi, stjóri í Faroe Ship, heldur ikki, at sjálvt talið av vitjandi nýtist at siga nakað serligt um dygdina av fiskivinnuframsýningini.

- Vit høvdu nógvar áhugaverdar vitjanir, kanska fleiri enn áður. Hetta er eitt frálíkt høvi hjá okkum at hitta viðskiftafólk, sum vit javnan hava samband við, men undir øðrum viðurskiftum, sigur hon.



*- NAFF er eitt gott høvi at hitta viðskiftafólk og annars at merkja tað rák, sum rørist í okkara parti av vinnuni, sigur Jóhanna á Bergi, stjóri í Faroe Ship*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**At merkja rák**

Jóhanna á Bergi sigur, at tey sum so ikki vænta sær at síggja tey stóru úrslitini beint á sjálvari framsýningini, men hetta er ein liður í tí viðskiftaarbeiði, sum hoyrir undir eina flutnings- og tænastufyritøku, sum Faroe Ship er.

- North Atlantic Fish Fair er soleiðis eisini eitt frálíkt høvi at merkja tað rák, sum rørist í okkara part av vinnuni, sigur Jóhanna á Bergi, stjóri í Faroe Ship.

# Alt gekk væl

**- Tað gekk væl at fáa gestirnar heim við flogfari, og tað gekk væl at fáa teimum innivist, sigur Fríðun Jacobsen hjá Greengate Incoming**

NAFF
*Vilmund Jacobsen*
vilmund@sosialurin.fo

Tað var felagið Greengate Incoming, sum syrgdi fyri at fáa flestu útlendsku framsýnararnar og gestirnar higar til lands, og felagið skipaði eisini fyri, at hesi fingu innivist og bilaleigu, eins og flutning millum flogvøllin og høvuðsstaðin.

Fríðun Jacobsen hjá Green Gate Incoming sigur, at øll hotellini í býnum vóru øll fult bookað, meðan North Atlantic Fish Fair var í høvuðsstaðnum.

- Eg haldi, at tað gekk væl at fáa allar gestirnar heim við flogfari, og tað gekk væl at fáa teimum innivist.

Hon sigur, at Greengate Incoming kortini ikki stóð aftanfyri flutningin og innivist hjá øllum útendsku gestunum, tí ein partur at luttakarunum syrgdu fyri hesum sjálvi.

- Vit fingu umleið 150 fólk higar til lands, sigur Fríðun Jacobsen hjá Greengate Incoming.